gult cyan magenta svart

Fólkakanning í Klaksvík endar sum supervitamintablett:

Laudrup setir pengar í føroyskt hugskot

Føroyski yvirlæknin Leif Knudsen og danska heimsstjørnan Michael Laudrup samstarva um arbei›i› vi› serligari vitamintablett, sum byggir á fólkakanning í Klaksvík

HEIMSPATENT
Ey›un Klakstein

Fyrst í komandi ári kemur ein n‡skapandi vitamintablett á markna›in, sum fer at samantvinna brúki› av ymiskum tablettum.

Aftan fyri hesa tablett stendur felagi› Sportscom Danmark Aps, sum er manna› vi› f‡ra meira og minni kendum persónum – har av ein er føroyingur.

Fyrrverandi fótbóltsspælarin og heimsstjørnan, Michael Laudrup, hevur saman vi› læknanum hjá danska fótbóltslandsli›num, Mogens Kreutzfeldt, sett pengar í felagi›.

Umframt teir bá›ar eru eisini Kern Lystrup og Leif Knudsen vi› í felagnum, og teir eiga hvør sín fjór›ing í fyritøkuni.

T‡dningarmikil kanning

Leif Knudsen, sum er stjóri í Sportscom, er føroyingur. Hann er útbúgvin í Danmark, men í árunum frá 1981 til 1992 var hann yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Í hesum tí›arskei›i skipa›i hann fyri eini umfatandi kanning av nor›oyingum.

Hann kanna›i, um nor›oyingar vóru líka hart raktir av gigtsjúkum sum onnur fólkasløg, og úrsliti› av hesi kanning hevur nú vi› sær, at felagi› hjá yvirlæknanum hevur fingi› heimspatent upp á n‡ggja serliga vitamintablett vi› l‡si, vitaminum og mineralum.

– Fólkakanningin, sum vit gjørdu í Klaksvík, hevur stóran t‡dning fyri okkara núverandi ætlan, sigur Leif Knudsen, sum í dag er yvirlækni á Grenå Centralsygehus og er serkønur í gigtasjúkum.

Hava ta› betur hóast sjúk

– Tá eg kom til Føroyar at arbei›a, gjørdist eg varugur vi›, at føroyingar eru ikki líka illa plága›ir at gigtasjúkum sum fólk a›rasta›ni, og tí fóru vit í holt vi› kanningina. Talan var í grundini um eina fólkakanning, tí vit kanna›u stóran part av teimum tilkomnu fólkunum í Klaksvík, sigur hann.

Leif Knudsen, fyrrverandi yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, stendur nú á odda fyri arbei›num vi› eini n‡ggjari tablett, sum júst hevur fingi› heimspatent.

Mynd: Klaksvíkar Sjúkrahús

– Ni›urstø›an av kanningini var, at klaksvíkingar hava akkurát líka nógva gigtasjúkur sum fólk í ø›rum londum, men stóri munurin er, at teir lí›a ikki eins nógv av sjúkuni, og nógv vita als ikki av, at ta› er ein gigtasjúka, tey hava, sigur Leif Knudsen.

Orsøkina til hesa stø›u heldur Leif Knudsen vera, at føroyingar eta so nógvan fisk, og ta› ger, at sjúkan ver›ur hildin ni›ri og plágar fólk nógv minni.

Tablettin

Hetta gav Leif Knudsen hugskoti› til at gera vitamintablettir vi› l‡si, og fyri fyrstu fer› nakrantí› er ta› eydnast at gera l‡si úr fiski til turrevni, sum kann blandast saman vi› øll hugsandi sløg av mineralum og vitaminum.

N‡ggja tablettin er somiki› serlig, at felagi› hjá Leif Knudsen hevur fingi› heimspatent upp á hana, og nú tí›indini frættast um tablettina, er áhugin uttan fyri Danmark fyri henni rættiliga komin til sjóndar.

– Í løtuni kanst tú fáa kapslar vi› l‡si og ymiskum vitaminum og mineralum, men ta› eru ymsir vansar kn‡ttir at brúkinum av hesum kapslum, sigur Leif Knudsen.

Fólk, sum eta hylki vi› fiskal‡si, gremja seg millum anna› um, at tey fáa ringan anda, og hylkini kunnu eisini órógva til dømis ítróttarfólk, tá tey eru í kapping.

– Sum heild eru kapslarnir ikki serliga sjarmerandi at taka, sigur yvirlæknin.

Bar ikki til tá

N‡ggja tablettin, sum enn ikki hevur fingi› navn, ver›ur kanska hóskandi rópt ein supervitamintablett, tí hon kann avloysa nógvar ymiskar tablettir.

– Í sta›in fyri at fólk taka upp í nevan av tablettum, kunnu fólk noy›ast vi› hesa einu tablettina. Í tablettini hava vit savna› 11 vitaminir, 7 mineralir og fiskal‡si, sigur Leif Knudsen.

Leif Knudsen royndi at fáa gongd á ætlanina vi› tablettini, me›an hann var í Føroyum, men ta› eydna›ist honum ikki. Millum anna› tí, at ta› tá ikki bar til at gera fiskal‡si til turrevni, sum er ein fortreyt fyri tablettini.

Allir kennast

Leif Knudsen og hinir tríggir menninir í Sportscom eru gamlir kenningar.

– Eg havi kent Mogens Kreutzfeldt í nógv ár, og hann var eisini onkuntí› og vitja›i meg í Klaksvík, tá eg starva›ist har. Michael Laudrup havi eg eisini kent í langa tí›, sigur Leif Knudsen.

– Eg havi havt hugskoti› vi› tablettini í nógv ár, men nú vit f‡ra hava funni› saman, hevur ta› fyri fyrstu fer› rættiliga bori› til at fara í holt vi› at gera tablettina.

Leif Knudsen og hinir í Sportscom hava fleiri gó› hugskot, sum teir ætla sær undir, men hann fær ikki greitt nærri frá teimum í løtuni.

Teir f‡ra menninir síggja stórar møguleikar í n‡ggju tablettini og samstarvinum, sum tykist vera rættiliga snildisliga sett saman. Har eru dugnalig og kend fólk í fyritøkuni, og ta› kann í hvussu er tryggja› nógva umtalu av vørunum hjá teimum.

N‡ggja vitamintablettin, sum ver›ur at fáa fyrst í komandi ári, er ætla› vanligum fólki.

Alt er enn óvist

Enn er eingin avtala gjørd um samstarv í Klaksvíkar b‡rá›i komandi f‡ra árini

KLAKSVÍK
Ey›un Klakstein

Mikukvøldi› høvdu Tjó›veldisflokkurin, Javna›arflokkurin og Sjálvst‡risflokkurin fund um eitt møguligt samstarv í Klaksvíkar b‡rá› komandi árini, men einki ítøkiligt kom burtur úr hesum fundi.

Vinnarin av b‡rá›svalinum í Klaksvík, Tjó›veldisflokkurin, vil fegin hava lei›sluna í b‡rá›num, men Javna›arflokkurin er eisini huga›ur at fáa borgarstjórasessin. Sí›ani vali› hava bæ›i Ey›gunn Samuelsen og Torleif Sigur›sson veri› nevnd sum evni til starvi›.

Toppskorarin hjá Tjó›veldisflokkinum, Steinbjørn Jacobsen, er eisini eitt gott bo›, og Jórun Høgnesen, sum var nummar tr‡ á Tjó›veldislistanum, hevur eisini veri› nevnd.

Kanska Fólkaflokkurin

Ta› hevur veri› mett sannlíkt, at teir tríggir flokkarnir gera samgongu uttan um Fólkaflokkin, men eingin torir enn heilt at avskriva› Fólkaflokkin.

Ta› tykist tó ver›a rættiliga greitt, at Fólkaflokkurin ikki fær borgarstjóran komandi árini, og so er spurningurin, um Fólkaflokkurin er sinna›ur at lata lei›sluna frá sær í einum samstarvi vi› Javna›arflokkin.

Jógvan vi› Keldu seg›i annars valkvøldi›, at Fólkaflokkurin ikki vildi lata lei›sluna frá sær í einum samstarvi vi› Tjó›veldisflokkin.

Í gjárkvøldi› skuldi fundur aftur vera millum Tjó›veldisflokkin, Javna›arflokkin og Sjálvst‡risflokkin.

Her eru nakrir tilvildarligir brúktir bilar, sum standa vardir í 1000 kvm. stóru bilhøll okkara.
Bilarnir hava fingið víðfevndar kanningar av okkara mekanikarum og seljast við 3 mðr. trygd.

P/f Wenzel

Farið altíð fyrst til Wenzel við Velbastaðvegin
Tlf. 31 38 73

Vann stóran sigur í deydligum strí›i

Vágbingar hava víst, at teir vilja hava Jógvan Krosslá at halda fram sum borgarstjóra í Vági. Og ta› er eisini alt, sum bendir á, at so ver›ur

KOMMUNUVAL
Áki Bertholdsen

– Eg taki hetta sum eina dygga álitisváttan frá vágbingum.

Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur í Vági er fegin um úrsliti› av kommunuvalinum.

Sjálvur var hann tann heilt stóri sigursharrin vi› 174 atkvø›um. Ta› er tvær og eina hálva fer›ir so nógv sum tann, i› fekk næstflestar atkvø›ur.

Ikki minst fegnast hann um, at bæ›i hann, og flokkurin, var›veitti stø›una í b‡rá›num.

Umframt at hann sjálvur var fyrstvaldur, gjørdi ta› frálíka vali› hjá borgarstjóranum, at hann hála›i tr‡ tjó›veldisfólk afturat vi› sær í b‡rá›i›.

Sostatt var›veitti tjó›veldisflokkurin stø›u sína sum nógv størsti flokkur vi› f‡ra umbo›um í b‡rá›num av teimum níggju, sum eru í alt.

Flokkurin hev›i eisini f‡ra umbo› í fráfarandi b‡rá›num. Men tvey av umbo›unum hesufer› eru n‡vald. Tey eru Mortan Mortensen og Turi› Kjærbo, sum bæ›i koma í b‡rá›i› fyrstu fer›. Tey komu fyri Niels vi› Gjógvará, sum ikki var› afturvaldur og Ingvør Hansen, sum ikki stilla›i upp aftur.

Deydligt valstrí›

Vágbingar annars veri› eitt sindur ørkymla›ir undan valinum og óvissan um, hvussu alt fór at tørna út, hevur veri› stór. Tí deydligari valstrí› enn uppundir kommunuvali› t‡sdagin eru ta› fáir vágbingar sum minnast.

Valgreinar í blø›unum hava ongar veri›. Nakrar fáar plakatir rundanum sjálvt valsta›i› var ta› einasta sum lukta›i eitt sindur av vali. Annars sást at kalla onki runt umkring í b‡num, sum bendi á, at hetta var dagurin, tá i› vágbingar skuldu velja, hvønn tey vildu leggja framtí›ina í hondina á.

Sjálvur sigur Jógvan Krosslá, at hann minnist ikki linari valstrí›. Men eisini ta› tekur hann sum eitt tekin um, at vágbingar hava veri› nøgdir vi› avriki›.

Heldur fram

Hetta valskei›i› hava ta› veri› tjó›veldisflokkurin, javna›arflokkurin og sambandsflokkurin, sum hava siti› í samgongu.

Og ta› er alt, sum bendir á, at hendan samgonan heldur fram. Tilsamans hava tey sjey av teimum níggju b‡rá›slimunum, og ta› er ta› sama, sum í valskei›num, i› endar nú.

Jógvan Krosslá sigur, at ongin avger› er tikin um n‡ggja samgongu.

– Men vit, sum sótu í samgongu, hava tosa› saman, og vit eru øll áhuga› at halda fram.

Hann heldur, at samstarvi› hevur gingi› so miki› væl, at ta› er ongin orsøk til at broyta ta›.

Ta› er eisini alt, sum bendir á, at Jógvan Krosslá heldur fram sum b‡rá›sforma›ur.

– Eg haldi, at vágbingar hava víst á meg sum b‡rá›sformann einafer› afturat, sigur Jógvan Krosslá. Sum nógv størsti flokkur, er ta› heldur onki at ivast í, at tjó›veldisflokkurin fer at krevja at fáa b‡rá›sformannin.

Jógvan Krosslá kom í b‡rá›i› eftir vali› í 1992 og hann hevur b‡rá›sforma›ur líka sí›ani.

Skuldin ni›ur

Jógvan Krosslá sigur, at tyngstu málini tey næstu árini ver›ur at betala skuldina ni›ur. Kommunan skyldar gott 70 milliónir og eftir avtaluni skulu 10% av skuldini betalast í avdráttum um ári› tey næstu fimm árini.

Næsta ár skulu sostatt 11 milliónir betalast í rentum og avdráttum.

Men tá i› tey fimm árini eru farin, skyldar kommunan líti› meiri enn eina álíkning, sum er gó›ar 32 milliónir.

Men b‡rá›sforma›urin sigur, at hesi bæ›u næstu árini ver›ur neyvan umstø›ur fyri at gera ta› stóra. Men aftaná ta›, ver›a ræsurnar rúmari.

Tó sigur hann, at ta› er brá›ney›ugt at útbyggja og d‡pa havnina fyri ikki at for›a vinnulívinum at mennast.

Valstri›i› í Vági hevur ongantí› veri› so deydligt sum uppundir hettakommunuvali›.Men ta› nerva›i ikki b‡rá›sformannin, tí tá i› atkvø›urnar vór›u taldar upp, hev›i hann vunni› stórsigur. Ì Vági búgva 1379 fólk. Valrætt hava 1.058 fólk. 857 fólk vóru á vali og ta› eru 81%

B36 bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini á Hálsi í døgunum 1.-2. des. 2000. Aldursbólkarnir eru hesir:

		Føðiár
1	Gentur 10-12	1989-1990
2	Smágentur 12-14	1987-1988
3	Gentur 14-17	1984-1986
4	Pinkulingar	1993-1994
5	Smápiltar	1991-1992
6	Piltar	1989-1990
7	Smádreingir	1987-1988
8	Dreingir	1985-1986
9	Unglingar	1982-1984

Spælt verður við stórum málum og málmanni. Á hvørjum liði eru 5 leikarar (málmaður íroknaður). Loyvt er at hava ein skiftisleikara.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Luttøkugjaldið er kr. 200 fyri hvørt lið.
Føroya banki, ið stuðlar kappingini, letur heiðursmerki til trý tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki.
Seinasta freist at boða frá luttøku er **týsdagin 28. november 2000.**
Tilmeldingin fer fram hjá umboðsmonnunum við hesar skúlar, ella við at ringja:

Tórshavnar Kommunuskúli	Jacob Thomsen, 31 62 29
Venjingarskúlin	Poul Rói Mohr, 31 68 95
Eysturskúlin	Ingi Højsted, 31 75 83
Hoyvíkar skúli	Gunnar Bláberg, 31 77 34
Santa Frans Skúli	Kenneth Djurhuus, 31 10 49
Argja skúli	Petur Mortensen, 31 04 10

Leygardagin verður kapping millum vaksnar leikarar úr B36, HB og landsliðnum. Eftir hesa kappingina verða leikbúnarnir tveittir út til áskoðarararnar.
Í sambandi við kappingina verður diskotek í B36-húsinum Leygarkvøldið 2. des. kl. 21.

www • team 85 • fo

Fínteljingin broytti

Til b‡rá›svali› í Runavíkar kommunu var bara ein atkvø›a, sum avgjørdi, hvør fekk níggjunda og seinasta sessin í b‡rá›num. Eftir fínteljingina misti Regin Jacobsen tvær atkvø›ur, og hann má tí lata Hans Jacobi Lamhauge sítt pláss í b‡rá›num

FÍNTELJING
Stefan í Skorini

Runavík: B‡rá›svali› var ógvuliga tætt, og menn vildu vera vi›, at teir ikki høvdu veri› vi› til eitt so tætt og spennandi val fyrr. Tí var spennandi um fínteljingin dagin eftir vali› fór at stjala nakrar avgerandi atkvø›ur.

Stø›an var hon, at Regin Jacobsen fekk tann seinasta sessin, tá talt var› upp valkvøldi›. Regin fekk tá 78 atkvø›ur.

Sitandi b‡rá›slimurin Hans Jacob Lamhauge fekk 77 atkvø›ur, og hann slapp sostatt ikki innaftur í fyrstu syftu.

Eftir fínteljingina var komi› fram til, at Regin bara fekk 76 atkvø›ur, me›an Hans Jacob Lamhauge var›veitti sínar 77.

Hans Jacob heldur tískil fram í b‡rá›num, me›an Regin Jacobsen dettur útaftur.

Nú Hans Jacob Lamhauge er valdur í b‡rá›i› hóast alt, vóru ta› tríggir av fráfarandi b‡rá›i, sum vór›u afturvaldir. F‡ra valdu ikki at stilla uppaftur, me›an tveir fullu vi› vali›.